gult10 cyan10 magenta10 svart10



## Nissan hevur framgongd

BILAR
*Eirikur Lindenskov*

Nissan í Japan hevur havt støðuga framgongd síðani Renault tók yvir konsernina, sum var um at fara á húsagang. »Trøllið«, tey kalla hann, Carlos Ghosn, sum Renault sendi til Japans fyri at venda fíggjarliga kaosinum, fyritøkan varð komin út í, hevur vent gongdini upp á rekordtíð, og er Nissan í Japan í dag ein yvirskotsforrætning

Nissan X-Trail:

# Kompromis millum jeep og persónbil

**Nissan hevur nú gjørt ein nýggja jeep, sum er eitt millumting millum vanligar jeepar og persónbilar**

BILAR
*Eirikur Lindenskov*

Nýggjasta skotið á Nissan 4X4 bulinum, Nissan X-Trail, varð fyri fyrstu ferð at síggja millum manna í Danmark á Bellamessuni í november í fjør. Nissan X-Trail, sum er ein sokallaður SUV, sum stendur fyri Sport Utility Vehicle, var í Bellasentrinum vístur í eini serligari útgávu, sum varð gjørd til framsýningar. Hesin bilurin varð væl móttikin – bæði millum journalistar og vitjandi annars.




SUV er eitt kompromis millum góðar landavegseginleikar og møguleikarnar fyri at koma fram í ringum lendi, sum krevur fýrahjólstrekk, men ikki við reduktiónsgearum, sum størru offroadararnir hava.

Nissan X-Trail hoyrir heima í tí størra endanum av klassanum við eini longd, sum er størri enn flestu konkurrentarnir. Tann totala longdin er 451 cm. Tó er Honda CR-V fýra cm longri.

X-Trail hevur verið at fingið í Japan í eina tíð, og hann kemur til Europa í hesum mánaðinum – og stutt eftir tað til Danmarkar.

Nakrir fáir danskir biljournalistar hava verið í Finnlandi og royndarkoyrt X-Trail. Teir siga m. a., at hann er góður at koyra í á landavegi. Undirvognurin er væleydnaður, og at koyra minnir bilurin mest um ein persónbil.

Fýrahjólstrekkið verður koblað til við eini viskosukobling. Á instrumentbrettinum ber til at kobla fýrahjólstrekkið heilt frá og síðani bara koyra við framhjólstrekki. Tað velja vit sjálvandi, tá vit koyra á landavegi, tá tað er mest orkusparandi.

Við einum øðrum knøtti ber til at seta skipanina á automatik. Tá koyrir bilurin framvegis við framhjólstrekkið, til framhjólini ikki sjálv megna uppgávuna. Viskosukoblining syrgir tá fyri at býta trekkið millum fram- og bakhjól – við í mesta lagi 43% til bakhjólini.

*Nissan X-Trail kemur á marknaðin við tveimum ymsum motorum. Einum tveirliturs bensinmotori við 140 hk og einum 2,2 liturs diselmotori við 114 hk*

Nissan X-Trail kemur á marknaðin við tveimum ymsum motorum. Einum tveirliturs bensinmotori við 140 hk og einum 2,2 liturs diselmotori við 114 hk.

Dieselmotorurin er í grundini tann sama, sum er í Almera, men í X-Trail er hann bøttur eitt sindur við nýggjari innsproytingarskipan, hana við common rail, sum gevur eina bleyta og mjúka motorgongd.

Til at koyra á ósløttum undirlag er tað ein avgjørdur fyrimunur at hava bilin við dieselmotorinum, og hann gevur eisini minni óljóð frá sær við javnari ferð. Stóra fyrimunin siga teir vera nýtsluna, sum eftir ES-norminum svarar til 13.9 km/l móti 10.8 km/l við bensinmotorinum.

Kabinan í X-Trail er praktiskt innrættað. Betrekkið á setrunum er servalt silkilíknandi evni, sum ikki dálkast so lætt. Nógv pláss er í kabinuni, har tú kanst leggja ymiskt frá tær. Í instrumentbrettinum eru tvey rúm, ið júst passa til eina sodavatnsdós. Hevur tú ein av bilunum við aircondition, so virka hesi rúm eisini sum køliskap, og tekur tað bara fimm minuttir at køla eina sodavatn niður til køliskápstemperatur.



*Nissan X-Trail, varð fyri fyrstu ferð at síggja millum manna í Danmark á Bellamessuni í november í fjør, tá Jan Hentze, sølumaður hjá Meinhardt Arge tók hesar myndirnar*


Nýggjan bil?

OPEL ASTRA



Leitar tú eftir nýggjum bili?
OPEL Astra fæst í fleiri variantum við ymiskum motorum, - eisini diesel. Trygdin er sett í hásætið, hann er sera økonomiskur, hevur framúr góðar koyrieginleikar og vakurt design.
Og so fæst hann eisini við sera nógvum hentleikum.

Komið og roynið hann.

Bilurin hevur 12 ára rustgaranti.

OPEL við Oyggjarvegin
P/F Meinhardt Arge
Tel 31 61 61 - Fax 31 83 18


gult11 cyan11 magenta11 svart11



Nýggjur Nissan Primera:

# Hópin av hentleikum

**Tann nýggi Primera frá Nissan er ein prima bilur við hópin av nýggjari tøkni**

NISSAN
*Eirikur Lindenskov*

Altjóða bilaframsýningin í Frankfurt hendan mánaðin verður karmur um frumsýningina av nýggja Nissan Primera við fimm hurðum.

Nýggi Primera koyrir longu nú í Japan sum fýrahurðaður sedan og sum stationcar. Hesar útgávur verða at fáa í Evropa á várið 2002. Útgávan við fimm hurðum kemur á marknaðin í Evropa fimm mánaðar seinni.




### Nýtt snið frá Nissaan

Eingin ivi er um, at tann nýggi Primera hevur vakt ans – longu tá royndarmodellið varð víst fram fyrstu ferð í París í fjør. Við sínum sermerkta og nýhugsandi sniði, vísir Nissan á nýggjar tíðir og leiðir. Stéphan Schwartz, designari á Nissan Design Europe sigur, at tann næsti Primera er nógv meira enn úrslitið av einum »designeksperimenti«.

– Primera er eitt tekin um okkara ambitiónir um at skapa ein praktiskan bil við dynamiskum eginleikum, sum rigga væl til tað flotta sniðið. Vit hava gjørt tann næsta Primera til fólk, ið dámar vill hugskot innan bilídnaðin. Málið hevur verið at skapa ein bil við egnum samleika, men sum kortini vísir virðing fyri framtíðini hjá Nissan og sum gevur nýtt lív til framleiðsluna.

### Hátøkni innan

Innan er nýggi Primera ein hegnislig blanding av komfort, yndi og hátøkni. Allir vísarar eru í miðuni á instrumentbrettinum – og ikki sum vit síggja í dag, har vísararnir eru beint framman fyri føraran. Í miðuni er eisini eitt sokallað dashboard-konsol við eini kombinatión av digitalum og tradtionellum funktiónum.

Innstilling av radio, fløguspælara, koyriupplýsingum, samskifti, navigatión og klimaanleggið er savnað í einum »keyboard tastaturi« við upplýsingum á einum sjeytumma skermi.

Her ber eisini til at síggja aftureftir við einum kamera, sum er oman fyri nummarplátuna aftan.

Sjónvarpstólið tendrar av sær sjálvum, tá tú setir bilin í bakgear og ger harvið parkering bæði tryggari og léttari.



*– Primera er eitt tekin um okkara ambitiónir um at skapa ein praktiskan bil við dynamiskum eginleikum, sum rigga væl til tað flotta sniðið, sigur Stéphan Schwartz, sum er designari hjá Nissan Design Europe*




*Innstilling av radio, fløguspælara, koyriupplýsingum, samskifti, navigatión og klimaanleggið er savnað í einum »keyboard tastaturi« við upplýsingum á einum sjeytumma skermi. Her ber eisini til at síggja aftureftir við einum kamera, sum er oman fyri nummarplátuna aftan*

## Nýggi Primera

Tann nýggi Primera kemur við hesum motorum

- 1.6L bensin við um 100 HK
- 1.8L bensin við um 114 HK
- 2.0L bensin við 150 HK
- 2.2L Dieselturbo við Common Rail við 125 HK


tann nýggi Almera Sedan er nú komin til landið




NISSAN
www.nissan-almera.com

P/F Meinhardt Arge
Undir Krákugjógv 5 · Box 3171 · FO-110 Tórshavn
Tel +298 345 400 · Fax +298 345 401 · nissan@nissan.fo